FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 10. desember 2025
J. nr.: 25/31815-2
Viðgjørt: MJ

Svar uppá fyrispurning nr. 52-056/2025 frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um avtøku av fráfaringaraldri.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýriskvinnan at avtaka fráfaringaraldurin?
2. Um ja, nær kann væntast, at ásetti fráfaringaraldurin fer í søguna?

Svar til spurning nr. 1-2:
Rundskriv nr. 9001 frá 9. mars 2022 um fráfaringaraldur er sett úr gildi 8. desember 2025.

Tað merkir, at starvsfólk hjá landinum ikki longur hava nakran ávísan fráfaringaraldur og at tey framyvir sjálvi avgera, nær tey ynskja at fara frá fyri aldur.

Í næstum verður farið undir at dagføra og gera vegleiðingar, sum tryggja, at eldri starvsfólk fáa tryggar og javnbjóðis arbeiðsumstøður seinastu árini á arbeiðsmarknaðinum.

Eg fegnist um, at vit í Føroyum umsíðir fáa eina meiri tíðarhóskandi skipan, ið ikki ger mismun á starvsfólki vegna aldur; eina rættvísari skipan, ið letur hin einstaka avgera, nær rætta løtan er at fara av arbeiðsmarknaðinum.

Tinganes, 10. desember 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum